

# GIGNI - heilsufrøði
## til børn og ung

www.gigni.fo

GIGNI

# Hvør er GIGNI
# - heilsufrøði til børn & ung?

Gigni er ein  stjálvstøðugur stovnur, beinleiðis undir Heilsumálaráðnum.

Gigni er ætlað øllum barnafamiljum, skúlabørnum og tannáringum í Føroyum

Familjur, ið flyta til landið í styttri ella longri tíðarskeið, eru eisini umfataðar av skipanini, og eru vælkomnar at seta seg í samband við Gigni.

## Visión:

Gigni - Heilsufrøði til børn & ung er ein miðsavnandi vitanar- og ráðgevingardepil, sum gongur á odda í tilgongdini at menna fólkaheilsu til børn og ung.

## Missión:

Gigni - Heilsufrøði til børn & ung skal savna vitan og vera ein sjálvsagdur ráðgevi hjá landsmyndugleikum, stovnum og øðrum fakfólkum, umframt alment at kunna um viðurskifti, sum viðvíkja fólkaheilsu hjá børnum og ungum.

Gigni - Heilsufrøði til børn & ung skal ganga á odda í heilsufremjandi og fyribyrgjandi átøkum, í mun til fólkaheilsu hjá børnum og ungum.



# Endamálið er:

- At fremja heilsu
- At fyribyrgja sjúku
- At styrkja og menna foreldraførleikan
- At trivnaðar- og menningartrupulleikar verða avdúkaðir og viðgjørdir skjótast tilber

# Stovnurin virkar fyri:

- At børn fáa eina jaliga og mennandi lívsbyrjan
- At børn og ung fáa heilsumennandi barna- og ungdómsár
- At styrkja og menna foreldraførleikar
- At økja tilvitanina um leiklutin at vera foreldur

Landafrøðiliga er arbeiðsøkið alt landið, og umfatar heilsufrøðiliga tænastu til 5500 smábørn og umleið 7000 skúlanæmingar, umframt ráðgeving til stovnar og skúlar v.m.

# Gigni hevur trý kjarnuøkir:

**1.** At veita heilsufrøðiliga tænastu til allar familjur, børn og ung í Føroyum, sum m.a er at ráðgeva viðvíkjandi likamligari, sálarligari og sosialari heilsu og trivna hjá børnum og ungum
**2.** At vera vitanar- og ráðgevingardepil hjá landsmynduleikum, barnaverndum, stovnum, lærarum, námsfrøðingum v.m
**3.** At hava eftirlit við likamligari, sálarligari og sosialari heilsu-, reinføris- og trivnaðar-viðurskiftum hjá børnum og almennu umstøðurnar fyri hesum.



> **"Gigni skal vegleiða og stuðla likamligu, mentalu og sosialu heilsuni hjá børnum og ungum, styrkja og menna foreldraførleikar**

# Hvat er ein heilsufrøðingur?

Ein heilsufrøðingur hevur nomið serútbúgving innan:

- likamliga, sálarliga og sosial heilsu og menning hjá børnum og ungum
- tilknýtið og foreldraførleika
- heilsufremjan

Fyri serútbúgving er ástøðiliga kravið, at viðkomandi skal vera sjúkraróktarfrøðingur, við hollum royndum innan pædiatri.

**Gigni - Heilsufrøði til børn & ung er í stuttum:**
**Fólkaheilsa til børn og ung**

**Meira um Gigni á www.gigni.fo**

> **GIGNI virkar fyri, at børn fáa eina jaliga og mennandi lívsbyrjan og heilsugóð barna- og ungdómsár!**

GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 • Postboks 132 • 110 Tórshavn • Tlf. 562300